# Søndag ("Sunnudagur")

Høvundur: Kim Fupz Aakeson (Danmark)
Myndprýðing: Eva Eriksson (Svøríki)
Gyldendal, 2011

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2013.

Søgugongd: Vit fylgja Torsteini í eina viku, meðan hann grundar yvir tað at gerast stóribeiggi. Torstein hevur nógvar tankar og stúranir um íkomnu støðuna og leitar sær ráð hjá sínum nærmastu. Ikki fyrr enn móti endanum vikuni verður ótryggleikin og óvissan skift um við kensluna av tryggleika. Samrøðurnar, hann hevur havt gjøgnum vikuna, hjálpa honum. Til dømis samrøðan við ommuna, sum veit hvat tað er at missa onkran. Torstein skilur nú, hvat tað er at vera elskaður og at elska onnur.

Fyri eitt barn kunnu stórir spurningar standast úr ítøkiligum støðum. Gjøgnum hesa vikuna, sum Sunnudagur fevnir um, lærir Torstein nógv um seg sjálvan og sítt pláss í lívinum. Bókin er eitt gott høvi at tosa við børnini um virði, sum veruliga hava týdning í lívinum.

Evni: Familja, lívið, deyðin, saknur, samband millum systkin og ættarlið, vinalag, kærleiki, tryggleiki, lívsroyndir og ásannan.

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum allaryngstu

**Hyggið at myndunum saman. Hvørjar spennandi smálutir finna tit? Hvat ger Torstein?**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat halda tit, bókin snýr seg um?**

**2. Hvat hugsar barnið um? Hvat plaga tit at hugsa um, tá tit liggja í songini?**

**3. Hevur tú havt tað á sama hátt sum Torstein?**




ISBN 978-952-7572-49-8

### MIÐLINGAR

**1. Hvat er kærleiki? Hvussu kennist kærleiki í kroppinum?**

**2. Hvønn elskar tú? Hvør elskar teg? Hvussu kann ein vísa, at ein elskar ein annan?**

**3. Tosar tú eisini við onnur um tað, tú hugsar um? Hvønn tosar tú tá við?**

**4. Hvat kann ein tosa við sínar vinir um?**

**5. Tekna eina mynd av teimum týdningarmestu menniskjunum í tínum lívi.**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat dámdi tær við bókini? Var okkurt, ið var torført at skilja? Síggja tit mynstur og líkleikar við aðrar søgur?**

**2. Er sunnudagur øðrvísi enn aðrir dagar vikudagar? Hvussu er hann øðrvísi?**

**3. Hvat heldur tú um søguna og myndirnar?**

**4. Skriva eina yrking um eina viku í tínum lívi.**

**LESIÐ EISINI:**

Øll telja við eftir Kirsten Roskifte: Samanberið myndina á fyrstu síðu við permuna á Sunnudagur.

## MÁLBITIN

**Dugir tú vikudagarnar? Vel eitt norðurlendskt mál og lær teg vikudagarnar á teimum ymsu málunum.**

svenskt: måndag, tisdag, onsdag, torsdag, fredag, lördag, söndag

danskt: mandag, tirsdag, onsdag, torsdag, fredag, lørdag, søndag

norskt: mandag, tirsdag, onsdag, torsdag, fredag, lørdag, søndag

íslendskt: mánudagur, þriðjudagur, miðvikudagur, fimmtudagur, föstudagur, laugardagur, sunnudagur

føroyskt: mánadagur, týsdagur, mikudagur, hósdagur, fríggjadagur, leygardagur, sunnudagur

grønlendskt: ataasinngorneq, marlunngorneq, pingasunngorneq, sisamanngorneq, tallimanngorneq, arfininngorneq, sapaat

finskt: maanantai, tiistai, keskiviikko, torstai, perjantai, lauantai, sunnuntai

norðursámiskt: mánnodat/vuosárga, disdat/maŋŋebárga, gaskavahku, duorastat, bearjadat, lávvordat, sotnabeaivi



Deilið myndir av tykkara lesiløtum við #nordiskabokslukaren!